LM-136/2020

Fylgiskjal 6.

FØROYA REIÐARAFELAG

Hoyringsskriv til uppskot til løgtingslóg um veiðigjøld fyri fiskiskap (veiðigjaldslógin)

Føroya Reiðarafelag hevur fingið uppskot til løgtingslóg um nýggja veiðigjaldslóg til hoyring, og felagið hevur hesar viðmerkingar.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum setti á heysti 2020 ein arbeiðsbólk at orða eitt uppskot um nýggja veiðigjaldslóg, og Reiðarafelagið hevur tikið lut í hesum arbeiðsbólki, sum hevur gjørt eina semju um eina nýggja skipan við veiðigjaldi. Spurningurin um eina skipan við veiðigjøldum hevur javnan verið til viðgerðar seinastu tíggju árini, síðani veiðigjøld av fyrstan tíð vórðu løgd á ávís fiskasløg. Hetta uppskotið er einfalt, gjøgnumskygt og krevur ikki stóra umsiting reiðaríum og almennum myndugleikum.

Reiðarafelagið hevur tó nakrar viðmerkingar til fyriliggjandi uppskot. Í fyrsta lagi er týdningarmikið at vísa á, at veiðigjøldini á uppsjóvarfisk eru sera høg samanborið við gjøldini í grannalondunum. Hetta setir kappingarførið hjá føroysku vinnuni í stóran vanda og kann hava við sær, at torført verður at endurnýggja allan flotan komandi árini. Hetta eigur politiska skipanin at hava í huga, tá ið veiðigjøld á føroysk skip verða viðgjørd. Til dømis eru veiðigjøldini fyri norðhavssild og makrel í Íslandi umleið 0,08 kr. fyri kilo, meðan gjøldini hjá grønlendskum skipum eru 0,4 kr. fyri makrel, 0,25 kr. fyri sild og 0,15 kr. fyri svartkjaft. Tey føroysku veiðigjøldini á uppsjóvarfisk eru sostatt væl hægri enn í teimum grannalondum, ið hava líknandi veiðigjøld.

Føroya løgting hevur seinastu árini ført ein politikk, ið hevur til endamáls at spjaða rættindini í uppsjóvarflotanum til fleiri skip. Hetta hevur verið eyðsæð hjá bæði undanfarnu og sitandi samgongu. Undanfarna samgonga útlutaði menningarkvotur uppá 8,5 prosent av føroysku kvotunum av norðhavssild, makreli og svartkjafti. Sitandi samgonga hevur síðani staðfest hesar kvotur og hevur harumframt útlutað kvotur til smærri reiðaríini ígjøgnum skipanina við vinnuligum royndum og verkætlanum, ið ískoytiskvoturnar eru ein partur av.

Tað er ein greið andsøgn ímillum at spjaða rættindi til fleiri skip, samstundis sum politisk ynski eru um at áseta hægri veiðigjøld. Tann sonevnda tilfeingisrentan minkar, um fleiri skip skulu hava atgongd til fiskiskapin, og hon er hægri, um rættindini eru savnað á fáum skipum. Føroya Reiðarafelag hevur ongar viðmerkingar til, hvussu kvoturnar verða býttar. Tó vísir felagið á, at spjaðing av rættindum stendur í greiðari andsøgn til at áseta hægri veiðigjøld.

Týdningarmikið er, at veiðigjaldspolitikkurin tekur støði í veruleikanum hjá flotanum og ikki eini teoretiskari útrokning av tilfeingisrentuni. Reiðarafelagið vísir eisini á, at útrokningarnar, sum Búskaparráðið hevur kunngjørt seinastu árini, ikki eru eftirfarandi. Orsøkin er m.a., at metingin av tí normalu lønini ikki er eftirfarandi. Harumframt eru óviðkomandi lønarútreiðslur tiknar við í útrokningina, soleiðis at samlaðu lønirnar eru yvirmettar, eins og fíggjarinntøkur frá óviðkomandi virksemi eru roknaðar uppí yvirskotið hjá flotanum. Harumframt verður tað normala avkastið roknað av tí bókaða skipavirðinum, sum gevur eina ógvuliga lága meting av tí normala avkastinum. Hetta ger seg serliga galdandi, tá ið flotin er gamal og hevur

Boks 361 • Óðinshædd 7 • FO-110 Tórshavn
Tlf. +298 73 99 12 • Teldupostur: stefan@industry.fo

tørv á útskifting. Um veiðigjøld verða ásett við støði í hesum útrokningum verður torført yvirhøvur at endurnýggja flotan.

Sum støðan er í løtuni hava fleiri uppsjóvarskip havt sera lítið ella einki virksemi higartil í 2021. Hetta merkir sjálvsagt bæði umsetning hjá reiðaríum og hýrur hjá manningini. Fyrra hálvár 2021 er tískil merkt av lítlum virksemi hjá teimum flestu uppsjóvarskipunum. Tá ið svartkjaftakvotan er lutfalsliga lítil í ár, verður eisini avmarkað virksemi í hesum fiskiskapi. Myndugleikarnir eiga tískil at taka hædd fyri, at fortreytirnar hjá teimum ymsu skipunum í uppsjóvarflotanum eru ógvuliga ymiskar.

Reiðarafelagið vísir á, at ein stór spjaðing er í tí føroyska uppsjóvarflotanum í dag. Hetta merkir, at árliga avreiðingarvirðið hjá skipunum vanliga liggur ímillum umleið 70 mió. kr. upp til umleið 190 mió. kr. Veiðigjøldini mugu taka hædd fyri, at uppsjóvarflotin er ein fjølbroyttur floti við sera ymiskum kvotagrundarlagi, har býtið millum makrel, norðhavssild og svartkjaft ikki er eins fyri øll skip. Týdningarmikið er, at øll reiðarí hava møguleika at virka undir hesi skipan. Veiðigjøldini taka í dag ein stóran part av yvirskoti og umsetningi hjá reiðaríunum, og politiska skipanin eigur at vísa hóvsemi í hesum máli.

Viðvíkjandi veiðigjaldinum á botnfisk í Barentshavinum er týðandi at vísa á, at í løtuni standa tríggir nýggir trolarar í gerð, og talan er um íløgur uppá umleið 1,2 mia. kr. tilsamans. Hesar íløgur hava ligið á láni í nógv ár vegna vantandi støðufesti í fiskivinnupolitikkinum. Gjaldið hjá hesum skipum svarar umleið til helmingin av rentum og avdrøgum hjá einum nýggjum skipi, og týðandi er, at grundarlagið undir hesum íløgum ikki verður nervað av teimum nýggju gjøldunum.

Týdningarmikið er, at slík veiðigjøld kunnu fylgja gongdini í vinnuni, soleiðis at tey kunnu lækka eins væl og hækka. Seinastu árini hevur politiska skipanin so líðandi hækkað veiðigjøldini – ofta við tørvi landskassans fremst í huga. Eisini er umráðandi, at møguleiki verður hjá reiðaríunum at byggja nýggj skip og at Føroyar kunnu hava ein tíðarhóskandi flota eins og grannalondini.

Eitt tilmæli frá arbeiðsbólkinum er, at føroysk skip aftur fáa loyvi at landa ein part av veiðuni uttanlands. Lóg um vinnuligan fiskiskap gav landsstýrismanninum heimild til at áseta reglur um, at í mesta lagi 25% av veiðuni hjá føroyskum skipum kundi avreiðast uttanlands gjørt upp hvønn ársfjórðing. Í upprunaliga uppskotinum til lóg um fyrisiting av sjófeingi í 2017 varð skotið upp, at føroysk skip skuldu avreiða í minsta lagi 75% av veiðuni um føroyskan bryggjukant, men hetta varð uttan viðgerð og hoyring broytt áðrenn 2. viðgerð í løgtinginum, soleiðis at øll veiða skuldi landast í Føroyum. Reiðarafelagið hevur áður eftirlýst at fáa eina betri javnvág millum áhugamál hjá reiðaríum og manningum og virkini á landi hinumegin. Tí hevði nú verið hóskandi at broytt lógina aftur, soleiðis at 25 prosent av veiðuni kundu verið landað uttanlands eins og skotið varð upp í lóg um fyrisiting av sjófeingi frá 2017.

Almennu viðmerkingarnar vísa á, at 8 ára rættindini renna út í 2026 og 2027, tá ið hesi fara at rinda vanligt veiðigjald. Mett verður, at fíggjarligi missurin hjá landinum er einar 40 mió. kr. Reiðarafelagið vísir á, at hetta er helst er talan um eina meting í brutto, meðan netto-missurin hjá landinum væntandi er væl lægri, tí at landið missir bæði lønarskatt og felagsskatt og møguliga kapitalvinningsskatt, tá ið gjøldini eru hægri. Tískil hevði verið meira rættvísandi at mett um tann veruliga missin hjá landinum heldur enn eitt mett brutto-tal.

Fyrimunirnir við hesi lóg eru, at gjaldið er einfalt og gjøgnumskygt. Eitt krav hevur verið, at gjaldið er endaligt eftir hvønn túr, soleiðis at manningin kann avroknast beinanvegin. Hetta hevur annars verið ein trupulleiki fyri uppboðssølukvoturnar, tí at tað endaliga gjaldið verður ásett árið eftir, at tær eru fiskaðar. Hetta ger gjaldið trupult at umsita hjá reiðaríunum.

Føroya Reiðarafelag vísir á, at føroyska fiskivinnan hevur fingið meira støðugar karmar at virka undir, har grundarlag aftur er fyri at keypa og byggja nýggj skip. Týdningarmikið er eisini at fáa veiðigjaldið í eina fasta

legu, soleiðis at tey ikki verða broytt við jøvnum millumbilum, og at tørvur landskassans ikki er avgerandi fyri støddina á gjaldinum. Týdningarmikið er eisini, at hildið verður fast við at føra ein støðufastan fiskivinnupolitikk, sum gevur greiðar karmar langt fram í tíðina.

Samanumtikið metir Reiðarafelagið, at tey føroysku veiðigjøldini eru ov høg, um hugt verður at samansetingini í flotanum, og um samanborið verður við samsvarandi gjøld fyri uppsjóvarfiskalsøg í grannalondunum. Gjørd er tó ein semja, soleiðis at ein slík skipan væntandi kann koma í eina fasta legu frameftir.

Føroya Reiðarafelag, 29. mars 2021

Stefan í Skorini, stjóri